# Ójavnt arbeiðsbýti - orsøkir og avleiðingar



Erika Anne Hayfield, PhD, lektari í samfelagsvísindum, Fróðskaparsetur Føroya



Hvørji eru nøkur av viðurskiftunum ella orsøkunum handan arbeiðsbýtið millum kvinnur og menn?

Er arbeiðsbýtið yvirhøvur nakað, vit skulu taka okkum av?



# Yvirlit yvir framløgu

- Føroyski samanhangurin søguliga
- Hugburð og atburð
- Er hetta ein trupulleiki, sum vit eiga at gera nakað við?



# Arbeiðsbýtið í føroyska samanhanginum frá einum søguligum sjónarhorni





Frá heiminum/garðinum sum framleiðslueind, til kapitalismu



# Føroyar sum oyggjasamfelag í norðurlendskum høpi

- Menn burturi í longri tíðarskeið, arbeiða á sjónum
- Kvinnur heima, arbeiða við at reka hús, barnauppaling osfr.

*Ikki nýttust teimum nakra javnstøðulóg ella kvinnufylking fyri at klára seg! Nei, tær fylktust í tí stilla, brutu upp um armar og tóku mansins arbeiði upp á seg, bæði í bø og haga.*
01.07.94 fríggjadagur, Dagblaðið, s. 20, Prentað røðu

*Bert orðið 'javnstøða' tykist at loypa fjáltur á fólk, sum um hon er nakað trúandi og vandafult, nakað ókristiligt, sum verður hon veruleiki hendir eitt skalvalop í samfelagnum. Javnstøða merkir bert, at øll menniskju skulu hava somu rættindi og somu møguleikar til arbeiði, menning og mentan.*
07.04.88, Fjúrtandi, s. 16, lesararbræv frá forkv. í Javnstøðunevndini

*At Skaparin nú setti mannin til høvd konu sínar, eins og hann sett Kristus til høvd samkomunar, tað fáa vit ikki gjørt so nógv við, sjálvt um vit so royna at muta ímóti við øllum hugsandi og óhugsandi andstøðuligum kynstri.*
14.11.92, Dimmalætting, s. 13, lesararbræv

*Eg minnist tá menn fingu 70 oyru um tíman og kvinnur 30 oyru, men eg minnist einki til, at vit vóru onøgdar; tað kravdist tí heldur ikki so nógv av okkum sum av monnum.*
31.8.88, Dagblaðið, s. 20, lesararbræv



At búgva í einum fjarskotnum oyggjasamfelagi, við eirindaleysum havi og veðri og har sorgarleikir á havinum merkti samfelagið, hava skapt tørvin á tilverutroyst, sum fyri nógv kom í form av tí, sum í Skorini et al. (2022), hava kallað ein meira *persónligan og víðgongdan kristindóm*.



# Hugburð og atburð


Hvussu samd/ur ella ósamd/ur ert tú við hesi útsøgn?
"Sum heild er javnstøða longu nádd í Føroyum"
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
12%
4%
25%
11%
34%
27%
14%
28%
9%
20%
7%
10%
Púra samd/ur
Samd/ur
Hvørki samd/ur ella ósamd/ur
Ósamd/ur
Púra ósamd/ur
Veit ikki
Menn
Kvinnur

# Hvussu stóran týdning hevur javnstøða millum kvinnur og menn fyri teg?




Er javnstøða millum kynini á hesum økjum í Føroyum?
Í heiminum/húskinum
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
14%
12%
55%
32%
20%
41%
11%
15%
Nei, menn eru fyri mismuni
Ja, tað er javnstøða millum kynini
Nei, kvinnur eru fyri mismuni
Veit ikki
Menn
Kvinnur

Hvør hevur ábyrgd av hesum í tykkara húsarhaldi?
Svar: Altíð ella sum oftast eg




Hvussu nógvar tímar arbeiðir tú vanliga um vikuna (tak yvirtíð við)?
Umsorganar samleika
Forsyrgjara samleika
100%
90%
80%
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
20%
30%
33%
14%
3%
15%
44%
21%
3%
18%
55%
37%
3%
3%
3%
30%
43%
12%
10%
4%
Kvinna við børnum
Kvinna uttan børn
Maður við børnum
Maður uttan børn
Minni enn 20 tímar
20-29 tímar
30-36 tímar
37-42 tímar
Meira enn 42 tímar

# Samband millum hugburð og atburð

Hugburð til javnstøðu og kynsleiklutir

Atburð: Arbeiðsbýtið millum kynini

Gransking vísir, at javnstøðuhugburð ikki altíð verður umsett til javnara arbeiðsbýti millum kynini

# Hugsjónir um kynsleiklutir




Kelda: Hayfield & Vágsheyg, komandi í 2024

# Hvussu kunnu vit ávirka eitt javnari arbeiðsbýti frá einum samfelagssjónarhorni




Er arbeiðsbýtið ein trupulleiki, sum vit eiga at gera nakað við?




# Nakrar avleiðingar av skeiva arbeiðsbýtinum

- Ítøkiligar avleiðingar:
  - Arbeiða meira, forvinna minni og eru tí verri stillaðar
  - Tær verða fasthildnar í einari støðu, har tær hava minni ávirkan og tað hevur við sær, at møguleikarnar at koma henni til lívs er torfør
  - Sterk kynsmentan ger tað sera torført at fara ímóti rákinum
  - Tað er minni legitimt hjá monnum at hava ein umsorganarsamleika
- Frítt val og karmar
- Kvinnur ikki við í avgerðum

# Samanumtikið

- Hugburðin um, at javnstøða hevur týdning er ov lítið sjónligt í arbeiðsbýtinum millum kvinnur og menn
- Fyri at ávirka arbeiðsbýtið er neyðugt at ávirka samanhangin, har arbeiðsbýtið fer fram
- Hugburð hevur týdning, men tað er ikki nóg mikið at ávirka hugburð – atburð formar hugburð
- Avleiðingarnar av skeiva arbeiðsbýtinum eru týðandi og víðfevnandi





Takk fyri!